

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 08 - 2012

# Atlantic Petroleum metgott úrslit

Atlantic Petroleum hevði metgott úrslit fyrra hálvár 2012. Felagið metir, at framleiðslan og úrslit áðrenn avskrivingar og leitikostnað (EBITDAX) verða hægri enn áður fráboðað Atlantic Petroleum framleiddi 449 túsund tunnur av kolvetni fyrra hálvár 2012, sum er tað mesta felagið hevur framleitt fyrstu 6 mánaðirnar í einum ári. Sølan, sum var 279 mió. kr., er tað mesta felagi. hevur havt fyri eitt hálvt ár. Úrslit áðrenn rentur og skatt fyrra hálvár 2012 var 77,2 mió. kr. Gjaldførið hjá felagnum er nú 275,4 mió. kr. Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, sigur, at framleiðslan fyrra hálvár varð hægri enn roknað varð við, og tí økir felagið sínar metingar til framlei.sluna fyri árið frá 700 800 tús. tunnur til 800 870 tús. tunnur. Felagið væntar eisini betri úrslit á.renn avskrivingar og leitikostnað (EBITDAX) fyri árið frá 200 270 mió. kr. til 270 350 mió. kr. Sannlíkt er eisini, at Atlantic Petroleum, fer at luttaka í trimum leiti- ella avmarkingarbrunnum afturat í ár. Umframt Spaniards brunnin, sum verður boraður seinni í ár í bretskum øki, er felagið í sámráðingum um at luttaka í tveimum øðrum brunnum. Harumframt gjørdi felagið eitt fund á Orchid leiðini í bretskum øki í vár og luttekur í Brugduboringini, sum fer fram á føroyskum øki í løtuni. Mynd Eitt av starvsfólkunum hjá Atlantic Petroleum umborð á framlei.sluskipinum Aoka Mizu, sum framleiðir olju frá tveimum feltum, sum felagið eigur í, Ettrick og Blackbird.